Jan Mortensen:

# Hetta líkist talibanismu og manipulatión

**Løgtingið og Landsstýrið vildi ikki vita av Arbeiðsoysiskipanini, tá ið hon var í stórum trupulleikum, men nú hon eigur pengar, eru hon knappliga áhugaverd, sigur Jan Mortensen, stjóri í vinnuhúsinum**

ARBEIÐSLOYSIS-SKIPANIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta líkist bæði talibanismu og manipulatión.

Eru fakfeløgini hvassorðað um ætlanina hjá politiska valdinum at taka Arbeiðsloysisskipanina frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og leggja hana beinleiðis á fíggjarlógina, er stjórin í vinnuhúsinum ikki mildari í sínum dómi.

– Hann sigur, at ætlanin byggir á eina tulking av stýrisskipanina, sum minnir um talibanismu.

Jan Mortensen vísir á, at ALS varð sett á stovn eftir eina semju ímillum fakfeløg og arbeiðsgevarar, samstundis sum lønarhækkingin ta ferðina varð sett í skipanina sum stovnsfæ.

Síðani hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum umsitið skipanina.

– Vit hava umsitið skipanina í góðum tíðum, men serliga hava vit umsitið hana í ringum tíðum, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.

Hann vísir á, at í ringastu kreppuni var skipanin í alstórum trupulleikum, men tá vístu politikararnir skipanini frá sær og vildu onki hava við hana at gera, júst tí at tað vóru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum eiga hana.



*– Tað vísir seg um um at embætisverkið vil ikki góðtaka eina løgfrøðiliga niðurstøðu og tað er ómetaliga torført at skilja tað, sum fer fram í løtuni, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum*

– Tá sluppu vit at eiga skipanina og máttu loysa trupulleikarnar sjálvi. Men nú eigur skipanin pening og tí er hon knappliga vorðin áhugaverd, staðfestir Jan Mortensen.

### Talibanisma og manipulatión

Hann sigur, at ætlanin hjá politiska valdinum at leggja ALS undir fíggjarlógina, byggir á eina tulking av stýrisskipanarlógini, sum minnir um talibanismu.

– Í londunum rundanum okkum eru skipanir, sum ALS og Samhaldsfasti heilt vanligar og tí er tað ómetaliga torført at skilja tað, sum nú fer fram.

Hann heldur, at spurningurin um ALS-gjaldið kann metast sum ein skattur, er ein akademiskt kjak og eg dugi ikki at síggja, hvussu tað skal vera avgerðandi fyri, hvussu vit skipa samfelagið.

– Hjá okkum snýr tað seg bara um at finna eina loysn, sum riggar væl.

Jan Mortensen vísir eisini á, at ein serfrøðingabólkur av løgfrøðingum hevur kannað og útgreinað, um ALS er skattur ella ikki og meirilutin kom til ta niðurstøðu, at talan var ikki um skatt.

– Men tað vísir seg sum um at embætisverkið ikki klárar at góðtaka hesa niðurstøðu og tí verður kortini gjøgnumtrumfað, at talan er um skatt.

– Til at hjálpa sær við hesum, varð ein nýggjur bólkur settur niður, men tá varð syrgt verður fyri, at bara tey rætttrúgvandi vórðu vald í bólkin og tey koma sjálvsagt til eina aðra niðurstøðu, sum hóvar til endamálið.

– Men tá ið fylgibólkurin, sum skal fylgja við arbeiðnum, at kalla bara er mannaður við fíggjarnevndarlimum, sum nú einaferð skal viðgerða uppskotið, líkist tað beinleiðis manipulatión.

### Fara á glið

Jan Mortensen sigur, at ætlanin er nú at fáa serfrøðingar at útgreina, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa, verður ALS og aðrar skipanir tiknar av, og lagdar undir ALS.

Men hann ivast ikki í, at verður ALS lagt á fíggjarlógina, fer skipanin á glið og so veit ongin, hvar tað endar.

– Hvørja trygd hava vit fyri, at inngjaldið í veruleikanum endar í ALS, tey árini, inngjaldið er størri enn útgjaldið, spyr hann.

Hann stúrir sostatt fyri, at endar ALS í stórapotti á fíggjarlógini, er vandi fyri, at peningur, sum í veruleikanum eigur at verða goldin inn í ALS, fer at verða tikin til onnur endamál,.

Undir øllum umstøðum metir hann at, at tað er sera ivingarsamt um partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava hug til at halda fram í stýrinum fyri skipanum, sum teir onga ávirkan hava á.

### Kundi valt aðra loysn

Jan Mortensen heldur, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum, hevur grein í sínum máli, tá ið hann av Løgtingsins røðarapalli ávaraði tingið ímóti at skapa sær óneyðugar trupulleikar og ávaraði ímóti, at politikarar stygdu arbeiðsmarknaðin frá sær og fingu hann ímóti sær.

Hann heldur, at ístaðin fyri at velja hesar konfrontatiónskósina við arbeiðsmarknaðin, kundi landsstýrið heldur sæð tað skilagóða í at savna allar skipanir, sum partarnir á arbeiðsmarkaðinum umsita, í ein arbeiðsmarknaðarstovn, fyri at loyst tær enn meiri frá politisku skipanini.

Hann hugsar her um ALS, Samhaldsfasta, Frítíðargrunnin og Barsilsskipanina og kanska aðrar skipanir við.

Meiri á síðu 16.

## Góðtaka ikki ætlanina

Tað, sum hevur fingið allan arbeiðsmarknaðinn á gos, er, at løgtingið í løtuni hevur eitt mál til viðgerðar, sum miðjar ímóti at staðfesta, at inngjaldini til ALS, er ein skattur.

Men samstundis er ætlanin at staðfesta, at tað er bara Løgtingið, sum hevur heimild at krevja skatt inn.

Samtykkir Løgtingið ætlanina, hevði tað borið í sær, at allur peningurin og øll inngjaldini í Arbeiðsloysisskipanini, skulu takast úr skipanini og leggjast beinleiðis á fíggjarlógina.

– Tað merkir í roynd og veru, at ALS verður avtikið, sigur stýrið í ALS, har fakfeløg og arbeiðsgevarar eru umboðað.

Og tað góðtaka tey ikki, tí tey siga, at ALS er ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir hava stovnað og sjálvir gjalda allan peningin í og sostatt eisini sjálvir skulu umsita.

Tað hevur eisini verið frammi, at hetta rakar ikki bara ALS, men bæði arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, barsilsskipanin og frítíðargrunnrin fáa somu lagnu.

Frítíðargrunnurin er ein grunnur, har øll frítíðarløn stendur, sum ikki er heintað.

# Fogh hittur føroysk lesandi

Anders Fogh Rasmussen hevur játtað at taka lut í kunningardegnum, sum Norðuratlantsbólkurin bólkurin á Fólkatingi skipar fyri tann 31. mars.

Hetta verður fyrsta ferðin, at høvi verður hjá føroyskum lesandi at hitta Forsætisráðharran undir slíkum umstøðum. Umframt Anders Fogh Rasmussen, verða fleiri aðrar navnframir danskir politikkarar partur av tiltakinum. Eitt nú undirvísingarmálaráðharrin, Bertel Haarder, Umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, floksformaðurin hjá danska Javnaðarflokkinum, Helle Thorning-Smith og uttanríkispolitiski framsøgumaðurin hjá Dansk Folkeparti, Søren Espersen.

Seinasta freist at tekna seg til tiltakið er fríggjadagin 24. mars.

**-mørk**

Lesið Sosialin - so eru tit við

